# Svar til spurning frá salinum undir panelorðaskiftinum í Leirvík hóskvøldið: ”Hvat gert tú, um tú verður valdur, og…?”

BERGUR D. JOENSEN

Undirritaði var spurdur av kirkjuráðslimi m.a., hvat eg geri, verið eg valdur biskupur og kvinnuligur prestur ella uppafturgiftur prestur verður innstillaður av kirkjuráðum til prestaembæti í Fólkakirkjuni. ”Vilt tú so víga og innseta slíkan prest.”

Eg svaraði, sum eg havi ætlað at svara, um fekk eg henda spurning, at lógin loyvir kvinnuligum og uppafturgiftum at gera prestatænastu í Fólkakirkjuni, líkasum lógin eisini loyvir prestum at hava aðra hugsan hesum viðvíkjandi. Eisini legði eg afturat, at biskupur hevur ábygd av, at lógin verður hildin, og hann skal tí syrgja fyri, at slíkir prestar verða vígdir og innsettir í fólkakirkjuni.

Tað vóru ikki øll hetta kvøldið í Leirvíkar missiónshúsi, sum ikki vóru nøgd við hetta svar, tí fólk vilja vita, hvat eg sjálvur vil gera, verið eg biskupur. Eg skilji hetta væl, og skal eg tí royna at koma nærri míni støðu viðvíkjandi hesum máli.

Eg svaraði hóskvøldið meiri yvirskipað, sum eg eisini hevði ætlað mær at svara, tí eg eri ikki helt liðugur við henda viðkomandi spurning. Hetta m.a. tí, at danska lógin viðvíkjandi rætti og skildum hjá biskupi, er tengd at fleiri biskupum, og vit nú bara hava ein biskup í okkara kirkjuskipan.

Men so langt eg eri komin eini støðu, vil eg, verið eg biskupur, ikki sjálvur víga ella innseta kvinnuligan ella uppafturgiftan prest, men lata annan prest, sum vil tað, gera tað.

Hetta er tað greiðasta og tað rættasta at gera bæði ímóti mær sjálvum og ímóti míni kirkju. Tað, ein lærir, hevur sína avleiðing á onkran hátt, hvørt ein er prestur ella biskupur. Í nevnda máli vænti eg at taka hesa avleiðing fyri mítt viðkomandi, og roknar mín kirkja eisini við at eg geri so (tí kom omanfyrisetti spurningur úr salinum).

Fólkatingslógin frá 1947, sum loyvir kvinnuligum prestum, fekk tí eina aðra lóg aftur at sær árið eftir í 1948 ”Lov om Adgang for biskopper til Fritagelse…” um rættindi og skildur biskupsins.

Í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu, sum gjørdi leistin fyri yvirtøkuna av fólkakirkjuni, stendur, at kirkjan skal eftir yvirtøkuna vera hin sama kirkjan, sum vit høvdu.

Í hesum sambandi er tað nú mín ætlan, at arbeiða fyri, at rætturin hjá embætisfólkum fólkakirkjunnar má ganga báðar vegir. Lógin má eisini galda, um ein prestur av eini ella aðrari orsøk ynskir umsjón av øðrum presti enn biskupinum. Tá má biskupur, sum tann leiðari hann er, finna loysn, um hesin prestur kennir seg kroystan á einhvønn hátt.

Eg gangi út frá at í eini rúmligari kirkju á fólkakirkjunnar grund ber altíð til at finna loysnir, um viljin er til tað. Tí verandi kirkjuskipan okkara er sera liðilig, um vit vilja nýta hana á skynsamiligan hátt. Mín vilji er, at nú skal alt setast inn fyri ikki at grava grøv fyri øðrum, men at finna varandi loysnir á teimum spenningum, sum hava verið kirkju okkara lítið sømiligir seinastu árini, og sum saktans kunnu vera verandi millum prestar í okkara ”lítlu” fólkakirkju, um einki ítøkiligt verðu gjørt.

Lógin um rætt og skildur biskups er galdandi fyri Føroya kirkju, og hon verður lagað føroyskum viðurskiftum. So verður bara eftir at fáa viljan at umsita hana, sum hon er ætlað: Í virðing hvør fyri øðrum at finna eina gongda leið í tí máli, sum fyri nærum allar biskupparnar (ein undnatikin!) og fyri helst nógv flestu prestar í 1947 var ein samvitskuspurningur.

Vóni, at hetta svar kemur spurninginum nærri, sum settur var mær. Fyrigev mær góðu fundarluttakarar, at eg ikki hevði fyrireika eitt greiðari svar til nevnda kvøld í Leirvík.

Eg vil, hvør so framtíð mín verður í fólkakirkjuni, gera mítt til, at kirkjan verður rúmlig – og tað báðar vegir. At eingin trýstir nakran til nakað ímóti síni sannføring og samvitsku, men at kristilig virðing og kristiligt tol verður víst hvør øðrum. Hevur ein mist frímóði sítt fyri tí, sum hoyrir Gudi til, hevur ein mist andaligu tænastuna á gólvið.

PS: Sí eisini svar mítt hesum viðvíkjandi í samrøðu við Dimmalætting.




# Jamma saman á gólvinum



**Hevur tú hug at blaka teg út í tað ókenda, út í ruðuleikan, har alt ber til? Ung í MáF bjóða til spennandi skeið í viewpoints í skúlanum á Giljanesi 21.-23. september 2007**

TÍÐINDASKRIV

Hevur tú hug at blaka teg út í tað ókenda, út í ruðuleikan, har alt er gjørligt? Vit arbeiða hart og konsentrerað á gólvinum. Læra at lurta, gera ov nógv av, og skava av aftur.

Viewpoints er improvisatiónsháttur, sum gevur sjónleikarum høvi at arbeiða spontant og intuitivt. Saman at lurta og at skapa dygdargott tilfar upp á stutta tíð.

Viewpoints er ein háttur at tosa saman um ávísar meginreglur á palli - eitt nú tíð og stað. Hvat riggar og hvat riggar ikki á palli, og hví. At lurta og at reagera, sansa og anda, flyta seg og standa still. Stutt sagt: Ein háttur at jamma saman á gólvinum.

### Royndur lærari

Lærari verður Gunnvá Zachariasen. Gunnvá hevur hildið fleiri skeið, m.a. í viewpoints, og hon hevur verið við í mongum leikum í Føroyum, Danmark og U.S.A. Hon er útbúgvin sjónleikari, og m.a. var hon við í “Ginusøgum”, “Don Juan fra Tranhuset”, “Ísbjarnunum”, “Faust” og øðrum leikum. Gunnvá hevur eisini spælt við í filmi og sjónvarpi og hevur stovnað sín egna sjónleikarabólk, “Tvazz”, sum hon nú er farin undir annan leikin við. Fyrsti leikurin hjá leikbólkinum, “Køksdrotningarnar” eftir eysturríkaran Werner Schwab, varð leiktur á Meiarínum í august mánaði í fjør.

### 14-30 ára gomul

Skeiðið byrjar fríggjakvøldið 21. september kl. 19, og vit gevast sunnudagin 23. september

kl. 15. Skeiðið er fyri øll 14 til 30 ára gomul, bæði fyri roynd og óroynd í sjónleiki. Tó er plássið avmarkað til 20 fólk. Vit gista og eta á skúlanum á Giljanesi. Áhugað kunnu senda meyl til maf@maf.fo ella ringja.